LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 20. apríl 2016
J.Nr.: LUM-32- 14/00094-12
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

Frágreiðing

frá

eftirlitsvitjan á

Frítíðartilboðnum við Landavegin

tann 26. november 2014

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

Innihaldsyvirlit

1. Inngangur 3

2. Skipan av eftirlitsvitjanini 4

3. Lýsing av Frítíðartilboðnum við Landavegin 5

4. Samrøða við eindarleiðaran og samskiparan 6
4.1. Børnini 6
4.2. Menningarætlanir 7
4.3. Samstarv við foreldur 8
4.4. Samstarv við skúlan 8
4.5. Samstarv við fyrisitingina í Almannaverkinum 8
4.6. Starvsfólk 10
4.7. Arbeiðsumhvørvi 10
4.8. Valdsnýtsla 10
4.9. Leigusáttmáli 10
4.10. Gjald 11
4.11. Eftirlit 11

5. Rundtúrur í húsinum 11

6. Samrøða við avvarðandi 12

7. Endalig samrøða við eindarleiðaran og samskiparan 12

8. Samandráttur 14

9. Tilmæli 16

1. Inngangur

Tann 1. oktober 2014 varð heimildin hjá Løgtingsins umboðsmanni víðkað til eisini at fevna um eitt serligt eftirlit við privatum stovnum o.ø., sum hava til uppgávu at taka sær av børnum og ungum. Umboðsmaðurin skal m.a. hava eftirlit við, at Føroyar halda ásetingarnar í Barnarættindasáttmálanum hjá Sameindu Tjóðum (ST) um at tryggja rættindi hjá børnum og ungum.

Í hesum sambandi gjørdi umboðsmaðurin av at fara á eftirlitsvitjanir á stovnum fyri børn og ung, sum hava menningartarn og/ella bera fjølbrek. Orsøkin til hetta var, at hesi børn teljast millum tey veikastu í samfelagnum og hava lítlan og ongan møguleika at siga frá sjálvi, um teirra rættindi ikki verða vird. Umboðsmaðurin gjørdi í fyrsta umfari av at fara á eftirlitsvitjanir í Frítíðartilboðnum við Landavegin í Tórshavn og í fjølbrekatoyminum Smæruni í Tórshavn og kanna hesar báðar stovnarnar nærri.

Eftirlitsvitjanirnar vóru gjørdar í samráð við teir báðar stovnarnar og Almannaverkið. Frammanundan eftirlitsvitjanunum varð ein fyrireikandi fundur hildin, tann 29. oktober 2014, í hølunum hjá Almannaverkinum á Smyrilsvegi. Frá umboðsmanninum luttóku Sólja í Ólavsstovu, umboðsmaður og Elinborg Apol, fulltrúi. Frá Almannaverkinum luttóku A, stjóri, B, leiðari á Fakdeildini, D, deildarstjóri í Trivnaðardeplinum, E, eindarleiðari í Trivnaðareind 5 og F, varaeindarleiðari í Trivnaðareind 7.

Umboðsmaðurin greiddi frá um heimildirnar, hon hevur, og orsøkina til, at hon hevði gjørt av at kanna júst hesi bæði frítíðartilboðini. Samstundis upplýsti hon, at hon fór at biðja um ymiskt tilfar í sambandi við eftirlitsvitjanirnar.

Eftirfylgjandi gjørdi umboðsmaðurin av at víðka eftirlitsvitjanirnar til eisini at fevna um Skúlan á Trøðni og umlættingarstovnarnar Eirargarð í Tórshavn og Reiðrið (nú Mýrusóljan) í Runavík. Á henda hátt var gjørligt at fylgja nøkrum av børnunum í fjølbrekatoyminum Smæruni gjøgnum allan gerandisdagin.

Heimildirnar fyri slíkum eftirlitsvitjanum eru at finna í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann, sum broytt við løgtingslóg nr. 157 frá 20. desember 2013 (umboðsmanslógini), og eru soljóðandi:

> "...
>
> **§ 4.** Virksemið umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins (t.e. lands- og kommunalu), og viðurskifti hjá børnum á privatum stovnum v.m., hvørs uppgávur beinleiðis viðvíkja børnum.
>
> ...

§ 5. Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær í § 4 nevndu umsitingareindir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

§ 6.

...

Stk. 7. Umboðsmaðurin kann kanna allar stovnar, myndugleikar og tænastustøð, sum eru fevnd av virkisøkinum hjá umboðsmanninum.

§ 8. Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt.

...

3. stk. Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.

..."

2. Skipan av eftirlitsvitjanini

Á eftirlitsvitjanini í Frítíðartilboðnum við Landavegin luttóku vegna Løgtingsins umboðsmann Sólja í Ólavsstovu, umboðsmaður, Elinborg Apol, fulltrúi og Irene Rønn Lind, sum vanliga starvast hjá Folketingets ombudsmand. Irene Rønn Lind er sálarfrøðingur og serkøn í sálarfrøði innan barnaøkið.

Eftirlitsvitjanin vardi í 3½ tíma og byrjaði við einum fundi við eindarleiðaran á stovninum, E, og samskiparan á stovninum, G. Aftaná fundin vísti eindarleiðarin umboðsmanninum runt á stovninum.

Í sambandi við eftirlitsvitjanina varð eitt uppslag sett upp á stovninum, har kunnað varð um eftirlitsvitjanina, og at tey børn, avvarðandi og starvsfólk, ið ynsktu tað, høvdu møguleika at tosa við umboðsmannin um viðurskiftini á stovninum og viðurskiftini hjá avvarðandi og børnunum. Eingi børn ella starvsfólk høvdu sett ynski fram um at tosa við umboðsmannin undir eftirlitsvitjanini, men umboðsmaðurin tosaði við avvarðandi. Avtalað varð, at stovnurin kunnaði tey foreldur, sum høvdu sett fram ynski um at tosa við umboðsmannin, men har tað ikki lá fyri, tann dagin umboðsmaðurin vitjaði, um at tey kundu ringja til umboðsmannin.

Eftirlitsvitjanin endaði við einum fundi við eindarleiðaran og samskiparan á stovninum.

Almannaverkið lat umboðsmanninum neyðug skjøl og upplýsingar í sambandi við eftirlitsvitjanina.

Áðrenn eftirlitsfrágreiðingin endaliga varð greidd úr hondum, varð ein fyribilsfrágreiðing send Almannamálaráðnum, Almannaverkinum og Frítíðartilboðnum við Landavegin til viðmerkingar. Ongar viðmerkingar vóru til fyribilsfrágreiðingina.

Í sambandi við eftirlitsvitjanina hevur umboðsmaðurin millum annað tikið útgangsstøði í niðanfyrinevndu reglum:

Lovbekendtgørelse nr. 100 af 2. mars 1988 om offentlig forsorg, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 83 frá 22. mai 2015.

Kunngerð nr. 6 frá 16. januar 1992 um ST-samtykt frá 20. november 1989 um rættindi barnsins – Barnarættindasáttmálin.

Sáttmáli sameindu tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

3. Lýsing av Frítíðartilboðnum við Landavegin

Frítíðartilboðið við Landavegin helt til á Landavegnum 63 í Tórshavn. Frítíðartilboðið hoyrir til trivnaðareind 5 í Trivnaðardeplinum hjá Almannaverkinum. Talan er um eitt frítíðartilboð aftan á skúlatíð til børn við menningartarni, t.v.s. børn frá 6-7 ára aldri og upp til 18 ára aldur.

Í endamálsorðingini hjá stovninum verður sagt, at:

> "Endamálið við arbeiðinum á stovninum er, at vit í tryggum umhvørvi eru við til at menna førleikarnar hjá børnunum, so at tey gerast før fyri at møta teimum avbjóðingum, ið lívið ber við sær. Í okkara arbeiði er tað av alstórum týdningi, at vit møta barninum, á tí støði tað er á, og út frá tí menna tey til at megna egið lív og avbjóðingar, og at tey í størstan mun læra sosialar reglar og at vera saman við øðrum menniskjum."
>
> Um námsfrøðiliga arbeiðið á stovninum verður sagt:
>
> "Vit leggja dent á at menna barnsins sosialu førleikar, at virka í felagsskapi og gerast sjálvstøðug menniskju. Við at geva barninum passandi avbjóðingar, ið tað megnar, styrkir tað um barnsins sjálvkenslu og sjálvvirði, sum førir við sær, at barnsins lívsvirði gerst betur.
>
> Námsfrøðiliga arbeiði á stovninum fevnir um túrar, matgerð, ítrótt, spøl, handaligt arbeiði o.a. Dentur verður lagdur á rørslu og motoriska menning. Vit gera ymiskt ítriv, ið er við til at læra børnini at hugsavna seg og sita still, meðan tey brúka sítt hugflog. Vit leggja dent á frítt spæl, og at børnini spæla sjálvi, har tey bæði sleppa at seta sítt hugflog í gongd, læra samspæl og samstarv, knýta vinabond og hava tað stuttligt."

4. Samrøða við eindarleiðaran og samskiparan

Eftirlitsvitjanin byrjaði við einari samrøðu við eindarleiðaran á stovninum, E, og samskiparan, G, sum er námsfrøðingur. Samrøðan var á donskum, soleiðis at Irene Rønn Lind skilti, hvat sagt varð.

Umboðsmaðurin greiddi frá, at vitjanin var ein liður í arbeiðinum, nú hon eisini var vorðin Barnanna umboðsmaður frá 1. oktober 2014. Arbeiðshátturin hjá umboðsmanninum er, at umboðsmaðurin tekur ímóti og viðgerð klagur umframt at fara á eftirlitsvitjanir. Í hesum sambandi hevði hon valt at leggja fyrstu eftirlitsvitjanirnar sum Barnanna umboðsmaður til stovnar við børnum, sum hava menningartarn og/ella bera fjølbrek, tí hesi børn eru so sárbær og eru ikki før fyri at klaga sjálvi. Umboðsmaðurin greiddi frá, at hon kom fyri at hyggja eftir, hvussu hølini vóru, hvørji tilboð hesi børn høvdu, um lóggáva manglaði á økinum, um Barnarættindasáttmálin varð hildin o.s.fr. Umboðsmaðurin ynskti at vísa á møguligar manglar fyri at bøta um korini hjá hesum børnum.

Ætlanin hjá umboðsmanninum var:
- at tosa um viðurskiftini rundan um børnini og starvsfólkini
- at hoyra um valdsnýtsla var millum børn og vaksin og/ella børn og børn
- at hoyra um handfaring av heilivági á stovninum
- at síggja teir fysisku karmarnar og taka myndir
- at hoyra, um aðrir eftirlitsmyndugleikar, so sum námsfrøðiliga eftirlitið, høvdu verið á stovninum

4.1. Børnini

Íalt tólv børn gingu á stovninum. Talan var um seks dreingir í aldrinum 9 til 16 ár og og seks gentur í aldrinum 10 til 18 ár. Børnini høvdu ymiskar diagnosur, so sum ADHD/menningarórógv, Downs syndrom, autismu og menningartarn. Okkurt av børnunum hevði eisini epilepsi.

Vanliga vóru níggju børn á stovninum. Fríggjadag vóru tó tólv børn á stovninum. Fýra av børnunum vóru so væl fyri, at tey kundu práta.

Hóast børnini vóru í ymiskum aldri, so hildu starvsfólkini, at hetta riggaði væl. Tað kundi vera torført, at børnini hava ymiskar diagnosur, men starvsfólkini føldu, at tey vóru før fyri at klára hetta.

Við skrivi, dagfest 4. august 2015, bað umboðsmaðurin Almannaverkið um at greiða frá, hvørja hugsan Almannaverkið hevði gjørt sær um aldursspjaðingina á stovninum serliga við tí atliti, at fleiri smágentur vóru á stovninum, onkur uttan mál, saman við hálvvaksnum ungum dreingjum.

Við skrivi, dagfest 1. september 2015, kunnaði Almannaverkið umboðsmannin um, at Almannaverkið í løtuni leigaði hølini á 1. hædd í Frítíðarheiminum í Skrivaragøtu og vísti til áður sent skriv til umboðsmannin um hetta leigumál. Almannaverkið fór í næstum at leiga hóskandi hús / stovn, har møguleiki varð fyri, at børnini kundu verða bólkað meiri upp, soleiðis at tey smáu og størri børnini kundu verða meiri hvør sær. Harvið kundi endamálsorðingin eisini náast, sum var at møta og menna børnunum og teimum ungu á tí støði, tey eru á. Verandi hølisumstøður góvu ikki møguleika at bólka børnini eftir aldri, tá tey vóru inni á frítíðartilboðnum. Tey vórðu tó bólkað, tá farið varð túrar, til svimjing, fótbólt o.l.

Almannaverkið upplýsti eisini fyri umboðsmanninum, at starvsfólk altíð vóru um børnini og vóru varin og eftiransin um møguliga vandan, ið kundi stinga seg upp í sambandi við, at teir ungu dreingirnir vóru í kynsbúnum aldri.

Undir eftirlitsvitjanini varð eisini tosað um, hvussu stovnurin handfór støðuna, um børn vóru harðlig, meðan tey vóru á stovninum. Upplýst varð, at í slíkum føri tosaðu starvsfólkini saman um hendingina fyrst, og síðani tosaðu tey við leiðaran. Leiðarin skrásetti slíkar tilburðir og gjørdi eina ætlan fyri víðari gongdini. Starvsfólkini høvdu fingið vegleiðing í, hvussu harðligar støður skuldu handfarast.

Tosað varð eisini um støðuna hjá børnum, sum fingu heilivág. Irene Rønn Lind, sálarfrøðingur, viðmælti, at har heilivágur møguliga kundi vera orsøk til, at børn blivu harðlig, átti sjúkrahúsdeildin fyri barnasálarfrøði at verða kunnað, soleiðis at deildin kundi gera eina meting av, um heilivágurin var gagnligur hóast hetta møguliga hjáárin. Okkurt slag av heilivági átti eisini at betra um innlæringina hjá børnum. Irene Rønn Lind, sálarfrøðingur, viðmælti, at børn, sum fingu slíkan heilivág, fingu í minsta lagi eina árliga heilsukanning, sum eisini fevndi um gagnvirknaðin av heilivváginum.

Við skrivi, dagfest 4. august 2015, bað umboðsmaðurin Almannaverkið um at greiða frá, um Almannaverkið hevði fylgt viðmælinum frá Irene Rønn Lind, sálarfrøðingi, viðvíkjandi teimum børnum, sum fingu heilivág.

Við skrivi, dagfest 1. september 2015, kunnaði Almannamálaráðið umboðsmannin um, at børnini á stovninum, sum fingu heilivág, vóru undir regluligum eftirliti, og at sjúkrahúsið stillaði heilivágin við jøvnum millumbili.

Eisini viðurskiftini viðvíkjandi børnum, sum sjálvi høvdu heilivág við sær á stovnin, vóru umrødd. Umboðsmaðurin vísti á, at hetta ikki var í lagi, tí talan kundi vera um nervastimbrandi heilivág, sum var umsetiligur á gøtuni. Leiðarin lovaði at taka hendan trupulleikan upp við avvarðandi foreldur.

4.2. Menningarætlanir

Eindarleiðarin vísti umboðsmanninum endamálsorðingina fyri Frítíðartilboðið við Landavegin.

Eindarleiðarin greiddi frá, at børnini vóru í Frítíðartilboðnum við Landavegin fyri at spæla í frítíðini, og tí vóru vanliga ikki virkisætlanir fyri hvørt einstakt barn, men bara ein felagsætlan. Tó vórðu virkisætlanir gjørdar fyri einstøk børn, um hesi høvdu serligar avbjóðingar. Eindarleiðarin upplýsti, at børnini á stovninum vórðu tikin við uppá ráð, tá ætlanir vórðu gjørdar. Hetta gekk fyri seg á tann hátt, at starvsfólkini tosaðu við børnini um, hvat tey ætlaðu sær dagin eftir. Tey høvdu ein kalendara, sum tey fylgdu.

Umboðsmaðurin spurdi um menningarætlanir vóru fyri hvørt einstakt barn. Eindarleiðarin greiddi frá, at nýggjari tilfar var til, men at Almannaverkið ikki hevði sent umboðsmanninum hetta.

Við skrivi, dagfest 4. august 2015, bað umboðsmaðurin Almannaverkið um at senda menningarætlanir fyri hvørt einstakt barn.

Við skrivi, dagfest 1. september 2015, kunnaði Almannaverkið umboðsmannin um, at av tí at børnini bara vóru á stovninum umleið 3 tímar um dagin, vóru menningarætlanir ikki gjørdar fyri hvørt einstakt barn, men arbeitt varð við smáum gerandismálum og sosialum leiðreglum, umframt kreativiteti, spølum og ítrótt. Almannaverkið sendi umboðsmanninum skrivligt tilfar fyri tey fimm børnini, har skrivligt tilfar var gjørt. Tilfarið var skrivað í mun til, hvussu arbeitt varð innan tey smáu átaksøkini. Almannaverkið upplýsti, at stovnurin var í ferð við at gera lýsingar og ætlanir fyri restina av børnunum á stovninum.

4.3. Samstarv við foreldur

Stovnurin bjóðaði foreldrunum til foreldraviðtalu einaferð um árið, ella eftir tørvi, og til ein felags foreldrafund einaferð um árið.

4.4. Samstarv við skúlan

Stovnurin hevði bara tvørgangandi samrøður við skúla og foreldur, tá serligar avbjóðingar vóru. Greitt varð frá, at stovnurin saknaði samstarv við skúlan, tí skúli og stovnur hava ymiskar upplýsingar og vitan um børnini, sum tað hevði verið gagnligt at vita um.

4.5. Samstarv við fyrisitingina í Almannaverkinum

Hvørt einstakt barn hevði ein málsviðgera hjá Almannaverkinum, sum skuldi leggja til rættis fyri barnið, tá tað bleiv 18 ár. Við hvørt upplivdi stovnurin, at eingin loysn var funnin, tá barnið fylti 18 ár. Nevnt varð, at bíðilisti var til arbeiðstilboð á vardum verkstaði. Hinvegin var eingin trupulleiki við bíðilista til sambýli, tí børnini búðu vanliga heima hjá foreldrunum eisini aftaná, at tey vóru vorðin 18 ár.

Við skrivi, dagfest 4. august 2015, bað umboðsmaðurin Almannaverkið um at greiða frá um hesi viðurskifti, og hvussu Almannaverkið tryggjar, at langtíðarætlanir eru fyri tey ungu á stovninum, tá tey fylla 18 ár.

Við skrivi, dagfest 1. september 2015, kunnaði Almannaverkið umboðsmannin um, at familjan hjá barninum hevur ein sosialráðgeva á Viðskiftadeplinum, Børn og ung. Uppgávan hjá sosialráðgevarunum er at veita ráðgeving og vegleiðing um møguleikan at søkja um:

- stuðul eftir forsorgarlógini, so sum endurgjald fyri neyðugar meirútreiðslur og endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku til persónar, sum heima uppihalda barni við likamligum ella sálarligum breki ella sjúku.
- stuðul, bú- og viðgerðartilboð og vardan bústað hjá Trivnaðardeplinum.
- stuðul eftir lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk ella fyritíðarpensjón.

Sosialráðgevin ger eina fakliga meting av stuðulstørvinum og ger tilmæli um stuðul eftir forsorgarlógini, lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk og pensjónslógini. Er tørvur á tí, kann ein virkisætlan leggjast fyri, hvørjar fyriskipanir skulu setast í verk og nær.

Hjá teimum, har mett verður, at lítil og eingin arbeiðsførleiki er til staðar, verður miðað móti at tryggja, at tey fáa ráðgeving og vegleiðing um møguleikan at søkja um fyritíðarpensjón, soleiðis at pensjón kann tillutast frá tí degi viðkomandi fyllur 18 ár.

Foreldur at børnum, sum eru fevnd av "Tí góðu tilgongdini" (mannagongd, ið er gjørd fyri børn og ung við autismu), fáa bjóðað ein árligan netverksfund og eina samskipaða virkisætlan, sum fevnir um fyriskipanir hjá økinum hjá Mentamálaráðnum, Heilsumálaráðnum (Psykiatriski depilin), Kommunufelagnum og Almannamálaráðnum.

Almannaverkið upplýsti víðari, at ein av fremstu ætlanum við bygnaðarbroytingum við at leggja Almannastovuna og Nærverkið saman var at tryggja, at borgarar við samansettum tørvi fáa eina samanhangandi tænastu frá Almannaverkinum. Tað er Viðskiftadepilin í Almannaverkinum, sum hevur til uppgávu at samskipa tær tænastur, sum borgarin kann fáa frá Almannaverkinum.

Allir borgarar, sum Almannaverkið hevur samband við, og har tað verður mett neyðugt, verða bjóðaðir til eina uppfylgjandi samrøðu, sum tekur støði í, hvussu vaksnamannatilveran skal tilrættisleggjast. Til samrøðuna verður ætlan løgd fyri bústaðar-, arbeiðs- og inntøkuviðurskifti, ella onnur viðurskifti, sum kunnu hava týdning.

Almannaverkið upplýsti, at Almannaverkið leggur seg eftir at fremja hesa samrøðu við 17 ára aldur. Royndirnar hjá Almannaverkinum vóru, at tað ikki var ein fyrimunur at hava samrøðuna fyrr, hetta grundað á, at borgarin ella foreldur sjálvi ikki vita ella ikki eru heilt greið um, hvørji ynski tey hava, umframt at borgarin møguliga kann mennast meira í hesum tíðarskeiði.

4.6. Starvsfólk

Til dagligt starvaðust fýra starvsfólk í Frítíðartilboðnum við Landavegin, tveir námsfrøðingar og tveir hjálparar. Fríggjadagar var ein eyka hjálpari. Eingin leiðari var á stovninum til dagligt, men ein samskipari var. Triðju hvørja viku varð samskiparin avloystur av einum øðrum námsfrøðingi. Starvsfólkini høvdu fingið skeið í at nýta Boardmaker. Fýra av børnunum dugdu bara teknmál, men starvsfólkini dugdu ikki teknmál/tekn til talu. Starvsfólkini fingu ikki supervisjón, bara ráðgeving viðvíkjandi hvørji amboð kundu nýtast. Starvsfólkini høvdu ikki fingið skeið í fyrstuhjálp og høvdu heldur ikki trygdarumboð.

Við skrivi, dagfest 4. august 2015, bað umboðsmaðurin Almannaverkið greiða frá, hvørja ætlan Almannaverkið hevði um, at starvsfólkini á stovninum fingu undirvísing í teknmáli/tekn til talu, soleiðis at tey vóru før fyri at samskifta við tey børn, sum bara dugdu teknmál. Eisini bað umboðsmaðurin Almannaverkið um at greiða frá, hvørja ætlan Almannaverkið hevði um, at starvsfólkini fingu skeið í fyrstuhjálp, serliga við tí í huga, at eitt barn á stovninum hevði epilepsi.

Við skrivi, dagfest 1. september 2015, kunnaði Almannaverkið umboðsmannin um, at í tíðarskeiðinum februar og mars mánaði 2015 fingu øll, uttan eitt starvsfólk, undirvísing í tekn til talu. Tað eina starvsfólkið fór at fáa undirvísing skjótast til bar, tá ið farið varð í gongd við hetta á Sambýlið í Eind 5.

Almannaverkið upplýsti eisini, at Almannaverkið í nærmastu tíð fór at skipa fyri, at starvsfólkini fingu skeið í fyrstuhjálp.

4.7. Arbeiðsumhvørvi

Í húsinum vóru fýra rúm, sum børnini kundu spjaða seg í. Fríggjadagar var ov nógvur larmur í húsinum, tí tá vóru tólv børn og fimm vaksin til staðar. Tá royndu tey at spjaða seg og fara út úr húsinum. Húsið var ikki vinarligt fyri autistar, tí har var ov nógv, sum ávirkaði. Neyðugt var ikki hjá starvsfólkunum at taka tung fysisk tøk.

Tey einstøku børnini vóru tengd at ávísum starvsfólkum. Tey einstøku starvsfólkini vóru vald út at taka sær av teimum børnum, sum tey vóru mett at hóska seg best til.

4.8. Valdsnýtsla

Um harðskapur kom fyri, varð hetta fráboðað økisleiðaranum, sum so hevði samrøðu við tey, sum vóru drigin inn í hendingina.

4.9. Leigusáttmáli

Lýsing av húsunum í leigusáttmálanum, sum umboðsmaðurin fekk útflýggjaðan frá Almannaverkinum, svaraði ikki til tær veruligu umstøðurnar. Leigusáttmálin var frá 2006 og var fyribils galdandi í eitt ár. Almannaverkið upplýsti, at eingin nýggjari leigusáttmáli var.

Heldur ikki var møguligt at finna ummæli frá Landslæknanum ella góðkenningar frá brunamyndugleikum og arbeiðseftirlitinum í sambandi við leigusáttmálan.

Av tí at Almannaverkið tók avgerð um at fara úr húsinum beinanvegin, gjørdi umboðsmaðurin ikki meira við hendan spurningin.

4.10. Gjald
Frítíðartilboðið við Landavegin var ókeypis. Foreldrini rindaðu 250,00 kr. um mánaðin fyri millummála.

4.11. Eftirlit
Almannaverkið bílegði námsfrøðiligt eftirlit úr Danmark. Námsfrøðiliga eftirlitið hevði fundir við foreldur, uttan at starvsfólkini vóru við. Eftirlitið hevði eisini ein fund við starvsfólkini og ein fund við børnini.

5. Rundtúrur í húsinum

Húsini vóru eini vanlig gomul sethús í trimum hæddum. Kjallarin var óinnrættaður. Í miðhæddini var høvuðsinngongd við trappu upp á loft, køkur, spískamari og tvær stovur. Á loftinum vóru trý kømur og tvey vesi. Vegna vánaliga bjálving, vóru húsini rættiliga køld. Í kjallaranum sást soppalíknandi vøkstur í betonginum. Húsini vóru klødd innan við bleytum, eldfimum plátum. Trappurnar upp á loftið vóru smalar og brattar og vóru óhóskandi sum rýmingarleið. Ongar brandtrappur vóru frá loftinum og út.

Undir rundtúrinum upplýstu starvsfólkini, at heilivágur hjá børnunum varð goymdur í einum ólæstum skápi í køkinum. Umboðsmaðurin vísti á, at hetta ikki var trygt, og at heilivágurin skuldi vera læstur inni, so at ikki einhvør hevði atgongd til hann. Eindarleiðarin fekk hetta í rættlag beinanvegin og ringdi og bílegði lás til skápið, meðan umboðsmaðurin var til staðar.

Tey børn, sum umboðsmaðurin prátaði við, meðan hon gekk runt í húsinum, lótu væl at. Tey søgdu seg dáma væl at ganga í Frítíðartilboðnum við Landavegin og dámdu teir aktivitetir, sum stovnurin bjóðaði. Sambandið millum starvsfólkini og børnini sá út til at vera gott.

Við skrivi, dagfest 4. desember 2014, boðaði umboðsmaðurin Almannaverkinum frá, at umboðsmaðurin ikki helt, at húsini vóru egnað at nýta sum karmur um frítíðartilboð til børn og ung. Umboðsmaðurin heitti á Almannaverkið um at finna onnur hóskandi høli til hetta virksemið.

Við telduposti, dagfestur 16. desember 2014, kunnaði Almannaverkið umboðsmannin um, at Almannaverkið hevði tikið avgerð um at fara úr húsinum. Sum fyribils loysn var avtala gjørd við Frítíðarheimið í Skrivaragøtu um at hýsa frítíðartilboðnum til tey ellivu børnini, ið talan var

um. Almannaverkið upplýsti víðari, at foreldrini vóru kunnað um støðuna, og at Almannaverkið arbeiddi við at finna eina aðra meira varandi loysn.

6. Samrøða við avvarðandi

Avvarðandi, sum tosaðu við umboðsmannin, vóru nøgd við, at børnini høvdu eitt tilboð sum hetta og eisini kundu koma til umlætting. Børnunum dámdu eisini væl at vera á stovninum.

Víst varð á, at kunningin frá stovninum var blivin betur. Foreldrini fingu kunningarbræv frá stovninum eina ferð um mánaðin, og foreldrini vórðu hoyrd og tikin við upp á ráð. Tó kundu tey avvarðandi hugsað sær menningarætlanir, har børnini t.d. sjálvi lærdu at taka bussin heim.

Tosað varð eisini um, at húsini, har stovnurin helt til, vóru gomul, vánalig og slitin, og at hølini vóru smá. Hóast hølini virkaðu heimlig, so var nógvur larmur har. Av tí at børnini vóru í so ymiskum aldri, var nógvur ófriður og nógvur tvídráttur. Garðurin runt húsið var ikki væl nýtiligur, tí hann ikki var hegnaður inni. Starvsfólkini á stovninum dugdu tó væl at nýta teir uttandura møguleikarnar, sum vóru nærhendis.

Avvarðandi vóru ógvuliga stúrin um, hvat skuldi henda við børnunum, tá tey blivu 18 ár, tí langtíðarætlanir manglaðu fyri børnini. Onkur kundi hugsað sær, at barnið flutti heimanífrá í seinasta lagi, tá tað varð 22 ára gamalt, men at hetta ikki var so lætt, tí so fá stovnspláss vóru í Tórshavn. Um barnið flutti á bústovn í t.d. Runavík, fór tað ikki sjálvt at verða fört fyri at taka bussin til Havnar at vitja familjuna. Viðmerkt varð, at fleiri stovnar áttu at verið bygdir til menningartarnað í Tórshavn.

7. Endalig samrøða við eindarleiðaran og samskiparan

Eftirlitsvitjanin endaði við eini samrøðu við eindarleiðaran, E, og samskiparan, G. Umboðsmaðurin greiddi frá, hvørjar trupulleikar hon ætlaði sær at taka upp í sambandi við eftirlitsvitjanina:

- Húsið var kalt og klætt við bleytum, eldfimum plátum. Vøkstur var í betonginum í kjallaranum. Trappurnar upp á loft vóru brattar og eingin neyðútgongd var uppi á loftinum.

- Aldursspjaðingin av børnunum var stór, og gentur á 10-11 ára aldri gingu á stovni saman við 16 ára gomlum dreingjum.

- Vantandi langtíðarætlanir fyri tey 15-16 ára gomlu børnini, sum gingu á stovninum.

- Starvsfólkini dugdu ikki teknmál/tekn til talu, hóast børn vóru á stovninum, sum ikki høvdu mál. Starvsfólkini høvdu ikki havt skeið í fyrstuhjálp, hóast barn var á stovninum, sum hevði epilepsi.

8. Samandráttur

Tann 26. november 2014 var umboðsmaðurin á eftirlitsvitjan í Frítíðartilboðnum við Landavegin í Havn. Stovnurin er karmur um frítíðartilboð aftan á skúlatíð hjá tólv børnum og ungum við serligum avbjóðingum. Børnini vóru í aldrinum 9 til 18 ár. Stovnurin helt til á Landavegnum 63, Tórshavn og er partur av trivnaðareind 5 í Trivnaðardeplinum hjá Almannaverkinum. Afturat umboðsmanninum luttóku eitt starvsfólk hjá umboðsmanninum og ein sálarfrøðingur á eftirlitsvitjanini.

Samanumtikið er umboðsmaðurin væl nøgd við vitjanina. Almannaverkið loysti beinanvegin ella vísti vilja at loysa teir trupulleikar, sum umboðsmaðurin vísti á. Tey børn, sum umboðsmaðurin prátaði við, lótu væl at. Sambandið millum starvsfólkini og børnini sá út til at vera gott.

Á vitjanini vísti umboðsmaðurin á stóru aldursspjaðingina á stovninum, og at smágentur vóru á stovninum saman við hálvvaksnum dreingjum. Almannaverkið kunnaði um, at hóskandi hús fóru at verða útvegað, har børnini kundu býtast upp, og at starvsfólkini vóru eftiransin viðvíkjandi vandanum fyri kynsligum ágangi.

Nøkur at børnunum fingu heilivág. Almannaverkið upplýsti, at hesi børn vóru undir regluligum læknaligum eftirliti. Heilivágur á stovninum varð goymdur í einum ólæstum skápi í køkinum, men hetta fekk eindarleiðarin í rætt lag, meðan umboðsmaðurin var á staðnum. Leiðarin av stovninum fór at taka støðuna upp við foreldrini, har børn sjálvi bóru umsetiligan heilivág uppi á sær.

Lýsingar og ætlanir við smáum gerandismálum, sosialum leiðreglum, kreativiteti, spølum og ítrótti vóru gjørdar fyri fimm av børnunum. Almannaverkið upplýsti, at líknandi lýsingar og ætlanir vóru í gerð fyri restina av børnunum á stovninum.

Sóknast var eftir langtíðarætlanum fyri børnini. Almannaverkið greiddi frá, at har tað verður mett neyðugt, fáa børnini, við 17 ára aldur, saman við foreldrunum bjóðað eina samrøðu við málsviðgeran um, hvussu vaksnamannatilveran skal leggjast til rættis. Foreldur at børnum við autismu fáa tó bjóðað ein árligan netverksfund og eina samskipaða virkisætlan.

Fýra av børnunum dugdu bara teknmál, meðan starvsfólkini ikki dugdu teknmál/tekn til talu. Okkurt av børnunum hevði epilepsi, men starvsfólkini høvdu ikki fingið skeið í fyrstuhjálp.
Almannaverkið upplýsti, at aftaná eftirlitsvitjanina høvdu øll, uttan eitt starvsfólk fingið undirvísing í tekn til talu, og at skipað bleiv fyri skeiði í fyrstuhjálp í nærmastu framtíð.

Umboðsmaðurin boðaði Almannaverkinum frá, at hon ikki helt húsini vera egnað at nýta sum karmur um frítíðartilboð til børn og ung, tí húsini vóru illa bjálvað, høvdu møguliga sopp og

brandtrygdin var ikki í lagi. Almannaverkið tók beinanvegin avgerð um at fara úr húsinum, fyribils í Frítíðarheimið í Skrivaragøtu, til ein meira varandi loysn varð funnin.

9. Tilmæli

Umboðsmaðurin mælir Almannaverkinum til, at øll børn, sum hava serligar avbjóðingar, og foreldur teirra, og ikki bara børn við autismu, sum eru fevnd av "Tí góðu tilgongdini", fáa bjóðað ein árligan netverksfund og eina samskipaða virkisætlan.

Umboðsmaðurin mælir eisini til, at eitt skipað samstarv verður millum Frítíðartilboðið við Landavegin og skúlan hjá børnunum um vitan og tørv hjá børnunum, til gagns fyri børnini.

Sólja í Ólavsstovu
Løgtingsins umboðsmaður

Klik her for at angive tekst.